# Hósdagur 31. oktober

**SVF**

17.30 Viftan
18.00 Toktummas 21
18.05 Pocahontas 26:26
18.30 Atlantis High
19.00 Føroyska kynbótararbeiðið við laksi e
19.25 Chaplin
20.00 Dagur og Vika
20.25 Grannar okkara
20.50 Gekkur
21.25 Gesturin
21.50 Læknin hevur orðið
22.20 Krimitímin: Blind gudinna 3:4 – norsk krimirøð - Óhóskandi fyri smábørn
23.15 Borð um borð e
0.05 Liðugt

**EUROSPORT**

7.30 Golf - Challenge Tour Fortis Bank Open Van Nymegen Gc Netherlands
8.00 Golf - U.S. P.G.A. Tour Buick Challenge Pine Mountain United States
9.00 Sailing - Sailing World
9.30 Equestrianism - World Cup Aarhus Denmark
10.30 Football - European Championships Legends
11.30 Wrestling - World Championship Moscow Russian Federation
13.00 Weightlifting - European Championship Turkey Antalya
14.30 Pool - World Championship
16.00 Snooker - Regal Masters Glasgow Scotland
18.00 Football - European Championships Legends
19.00 Sailing - Louis Vuitton Cup New Zealand Auckland
20.00 Boxing - To be announced
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Football - Uefa Cup
23.45 Rally - World Championship Australia Perth
0.15 News - Eurosportnews Report

**BBC PRIME**

0.15 TLZ: »A History of British Art – All Change«
1.05 TLZ: »Enigma – The Making of a Hardback Hero«
2.00 TLZ: »Poppea«
2.35 TLZ: »Lesley Garrett Tonight«
3.05 TLZ: »Computing for the Terrified – Designs & Mis«
3.35 TLZ: »Branded – Nike – Why do it?«
4.00 TLZ: »Renaissance Secrets – The Italian Patient«
4.30 TLZ: »At the Local«
5.00 TLZ: »Greek Language and People – Finding somewhere to Stay«
5.30 Look Ahead
6.00 Step Inside: »A Bun for Barney«
6.10 The Story Makers: »Nursery Ryhmes«
6.30 Toucan Tecs: »Desert Island Ducks«
6.40 VIP: »Usk«
7.05 50/
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Going for a Song
9.15 The Antiques Show
9.45 Changing Rooms: »Disney«
10.15 Vets In the Wild
10.45 Lovejoy: »Guns and Roses«
11.45 The Weakest Link
12.30 Passport to the Sun
13.00 Eastenders
13.30 House Invaders
14.00 Going for a Song
14.30 Step Inside: »A Bun for Barney«
14.40 The Story Makers: »Nursery Ryhmes«
15.00 Toucan Tecs: »Desert Island Ducks«
15.10 VIP: »Usk«
15.35 50/
16.00 Barking Mad
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Antiques Roadshow Anniversary Special
19.00 Eastenders
19.30 Dog Eat Dog
20.15 A little later: »Tom Jones«
20.30 Chambers: »The Bomb Scare«
21.00 Blackadder II: »Head«
21.30 Harry Enfield and Chums
22.00 Attachments: »Hotmail«
23.00 Cardiac Arrest: »The Shallow End«
23.30 Cardiac Arrest: »A Cold Heart«

**BBC WORLD**

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 Hardtalk (R)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Fast Track (R)
1.45 Holiday (R)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Australia Direct (R)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Asia Today (R)
3.45 World Business Report (R)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 Hardtalk
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Fast Track (R)
8.45 Holiday (R)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 Australia Direct (R)
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 Asia Today
10.45 World Business Report
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 Hardtalk (R)
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 World Business Report
12.45 Sport Today
13.00 BBC News – followed by Weather
13.30 The Car's The Star (R)
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 Asia Today
15.00 BBC News – followed by Weather
15.30 Hardtalk (R)
16.00 BBC News
16.30 Australia Direct (R)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report – followed by Weather
17.30 Talking Movies (R)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 Hardtalk (R)
20.00 BBC News – followed by Weather
20.30 Click Online
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 Life
23.00 BBC News – followed by Weather
23.30 World Business Report (R)
23.45 Asia Today

**TV3**

5.00 Garfield og venner
5.25 Børnehjørnet
7.00 TV-SHOP
9.20 Rescue 77
10.15 Rescue 77
11.05 Horton-sagaen
12.00 Horton-sagaen
12.50 Ricki Lake
13.50 En fremmed i byen
15.35 Med på moden
16.05 Ricki Lake
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Sabrina - skolens heks
18.00 Alle tiders barnepige
18.30 TV3 Extra
19.00 Direkte: Sverige-Danmark – World Cup i herrehåndbold
21.00 Klædt af til mord
23.00 Frid's Film
23.40 Line's
0.40 TV3 Extra
1.10 Murder Live
2.50 Benny Hill 9
3.25 Benny Hill 0
4.00 Benny Hill 1
4.35 Godnat

**ÚF**

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Henry Debes Joensen á Argjum lesur
7.15 Barnaløtan - Katrin og Kári stíla fyri
7.30 Tíðindi
7.35 Góðan morgun Føroyar
8.00 Tíðindi
8.03 Góðan morgun Føroyar
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Henry Debes Joensen á Argjum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen stílar fyri
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Sostatt (e) - Jóhann Mortensen og Bjørt Samuelsen leggja til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Birgar Johannesen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Í vingarðinum
17.00 Tíðindi
17.05 Viðurgerði - Sending við reportasjum, samrøðum og frásagnum úr Suðuroy
18.00 Barnaløtan (e) - Katrin og Kári stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini - fimta sending - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 David Copperfield - Elin Heinesen lesur 10. part av framhaldssøgu eftir Charles Dickens. Jens Pauli Heinesen týddi
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Skiftissiðir á lívsleiðini

ÚF Hóskvøldið kl. 19.00

– 5. sending

Marjun Bæk, prestur sigur frá trúlovilsi og ymiskt í sambandi við giftu, og tá illa vil til – tá fólk skiljast.

## Gekkur




## Klædt af til mord




Ein millióningur verður funnin deyður í heimi sínum, og tað sigst verða eitt hjartaslag. Hann er bundin til songina og eitt intimt videoband við honum og elskarinnuni er í bakgrundini. Men tað vísir seg seinni, at hann hevur kokain í blóðinum, og allir hansara 8 milliónir dollarar skulu gevast elskarinnuni – Rebecca Carlson. Hon verður handtikin undir illgruna fyri morð. Tað eydnast henni tó skjótt at rúnarbinda sín sakførara við sjarmu og sex-appel, og skjótt byrjar eitt vandamikið forhold teirra millum. Tá nýggj prógv verða løgd fram á borðið byrjar sakførarin tó at ivast…

Leikandi: Madonna, Michael Forest, Willem Dafoe, Julianne Moore, Joe Mantegna o.o Leikstjóri: Ulrich Edel.

## Morgunlestrar

28. oktober–2. november

***Henry Debes Joensen á Argjum lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 28. oktober:**
nr. 326 Tú gavst mær, o, Harri, her livilig kor
Áps. 2,20
nr. 543 O, Guð, vár hjálp í farnu tíð

**Týsdagin 29. oktober:**
nr. 396 Komi ríki títt við megi
Róm 14,17
nr. 402 Guð, títt er ríkið

**Mikudagin 30. oktober:**
nr. 394 Faðir vár í himlasølum
Matt. 6,6
nr. 390 Himnafaðir vár, vit biðja

**Hósdagin 31. oktober:**
nr. 497 Hjá tær, mín Jesus, har er trygt
Jóhs. 14,3
nr. 330 Yndislig, føgur

**Fríggjadagin 1. november:**
nr. 285 Eitt snjóhvítt herlið er at sjá
Op. 2,10
nr. 222 Eg komi skjótt, so sigur himnakongur

**Leygardagin 2. november:**
nr. 590 Vár Guð er verjan og verndin góð
Jóhs. 1,44
nr. 578 Nú byrja vit í Jesu navn

**Rás 2**

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Floksting (e) - Endursending frá í gjár - Hesaferð við Sjálvstýrisflokkinum - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi
1515 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith leggur til rættis
16.00 Tónleikur
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Andaligur búnaðskapur (8:8) - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.15 Sjólívið v/ Malmberg Olsen
15.00 Horizon Star v/ Stella Zachariassen
16.00 Sjómanssendingin Vitin v/ M. C. Restorff (e)
17.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
18.05 Tónleikur
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 Tónleikur
20.00 Barnalindin (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 - Heimasíða: www.lindin.fo
0.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti (e)
0.05 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
2.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e) - v/ Símun Absalonsen og Jógvan Zachariassen
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast



## UTTAN ÚR HEIMI

# 700 gíslar í Moskva

**Mitt undir øðrum parti av einum sangleiki lupu alvápnaðir kekenskir uppreistrarmenn inn á pallin í einum leikhúsi í Moksva. Løtu seinni høvdu teir tikið næstan 1.000 gíslar**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*



*Gíslarænararnir lótu nakrar av gíslunum sleppa úr leikhúsinum gjáranáttina. Teirra millum var hendan kvinnan, sum slapp út, tí hon er við barn*

Russiski forsetin, Vladimir Putin, hevur fleiri ferðir umrøtt uppreistrarmenninar í Kekenia sum yvirgangsmenn, og fyrrakvøldið gekk sjón fyri søgn, tá umleið 40 alvápnaðir kekenar tóku næstan 1.000 fólk gíslar í einum leikhúsi í Moskva.

Kravið hjá gíslarænarunum var sum væntað, at russiski herurin skal taka seg úr kekenia, og tað skal hann gera innan eina viku, krevja gíslarænararnir. Verður kravið ikki eftirlíkað, eru rænararnir til reiðar at lata lív fyri sína søk, sum teir tóku til í boðunum til russisku myndugleikarnar.

Fyrrapartin í gjár lótu myndugleikarnir tveir kekenskar politikarar fara inn í leikhúsið at tosa við gíslarænararnar. Samstundis høvdu rænararnir kravt at sleppa at tosa við umboð fyri Reyða Kross og umboð fyri felagsskapin Læknar Uttan Landamark. Eitt annað krav var, at teir vildu sleppa at tosa við russisku tíðindakvinnuna Onnu Politovskaja, sum eftir øllum at døma er tað einasta russiska blaðfólkið, sum hevur arbeitt í Kekenia seinastu árini og haðani sagt frá krígnum millum kekenar og russar.

### Fleiri útlendingar

Stutt eftir gíslatøkuna sluppu nakrir gíslar út. Talan var um nøkur eldri fólk og børn og nakrar kvinnur, sum eru við barn. Tað ljóðaði eisini, at gíslarænararnir høvdu latið allar muslimar sleppa úr leikhúsinum.

Gjáramorgunin ljóðaði, at gíslarænararnir eisini vóru til reiðar at lata allar útlendskar ríkisborgarar sleppa út, men seinni vórðu hesi tíðindini avsannað. Tað er ikki greitt, hvussu nógvir útlendingar eru millum gíslarnar, men sagt verður, at í hvussu er nakrir týskir, bretskir, niðurlendskir, danskir og eysturríkskir ríkisborgarar eru millum gíslarnar.

Danska uttanríkisráðið váttaði í gjár, at tveir danir eru millum gíslarnar.

### Høvdu spreingievni við sær

Russiska løgreglan kringsetti alt fyri eitt leikhúsið, og alvápnaðir trygdarmenn vóru at síggja allastaðni kring leikhúsið. Samstundis fræ ttist, at myndugleikarnir høvdu hert eftirlitið allastaðni í býnum, og at vápnaðir hermenn vóru at síggja á jarnbreytarstøðum og aðrastaðni í Moskva.

Í gjár var ógreitt, hvat myndugleikarnir ætlaðu at gera, kom einki burtur úr samráðingunum. Tað ljóðaði úr Moskva, at gíslarænararnir høvdu nógv vápn og spreingievni við sær inn í leikhúsið, og at teir longu høvdu lagt spreingiløðingar ymsastaðni í húsinum.

Fleiri av gíslunum høvdu fartelefon uppi á sær, og frá teimum fræ ttist, at støðan inni í leikhúsinum var sera spent. Ein av gíslunum heitti inniliga á myndugleikarnar um ikki at leypa á leikhúsið, men heldur at tingast við kekenararnar. Tann skelkaða kvinnan greiddi frá, at gíslarænararnir tóktust vera frá sær sjálvum, og at teir vóru til reiðar at spreingja bæði gíslar og seg sjálvar í luftina, søkti russiska løgreglan at leikhúsinum.

Vladimir Putin, forseti skuldi fara til Týsklands í gjár at vitja Gerhard Schrøder, kanslara, men ferðin er nú útsett.

# Tveir menn tiknir í snigskjúttamálinum

**Løgreglan í Maryland hevur tikið tveir menn í sambandi við snigskjúttadrápini**

SNIGSKJÚTTAMÁLIÐ
*Árni Joensen:*

Løgreglan í Maryland í USA tók í gjár tveir menn, tí illgruni er um, at teir kunnu hava samband við tey nógvu snigskjúttadrápini, sum hava verið á Washington-leiðini seinastu vikurnar.

Teir tiknu eru tann 42 ára gamli John Allen Williams ella John Allen Mohammad, sum hann eisini nevnir seg, og fostursonur hansara, tann 17 ára gamli John Lee Malvo.

Sambært løgregluni høvdu teir báðir menninir ligið og sovið í einum hvítum vøruvogni av slagnum Chevrolet Caprice. Løgreglan hevur leingi leitað eftir einum hvítum vøruvogni, sum eygnavirtni siga seg hava sæð á fleiri av drápsstøðunum. Tá so løgreglan fekk boð um tann hvíta bilin, gjørdi hon av at steingja ein ellivu kilometrar langan vegatein umleið 80 kilometrar í útnyrðing úr sjálvum Washingon býi. Løtu seinni vórðu teir báðir menninir tiknir.

Í gjár vildi løgreglan í Maryland ikki siga, um hon hevur illgruna til teir báðar menninar, men ein talsmaður hjá løgregluni segði, at menninir eftir øllum at døma hava upplýsingar í sambandi við snigskjúttadrápini.

## Fleiri húsagangir

Hagtøl, sum vórðu løgd fram í Oslo í gjár, vísa, at hetta seinasta árið eru 20 prosent fleiri norskar fyritøkur farnar á húsagang enn teir tólv mánaðarnar frammanundan.

Í gjár skuldu 14 av teimum fyritøkunum, sum eru skrásettar á børsinum í Oslo, kunngera sínar roknskapir, men hagtølini vísa, at nógvar fyritøkur koma ongantíð so langt, at tær fáa lagt sínar roknskapir fram.

Í stóra sakføraravirkinum Selmer verður sagt, at tey hava havt við fleiri húsagangir at gera hetta seinasta árið enn fyrr. Í kreditteftirlitinum siga tey, at nógvar fyritøkur hava trupult við at standa seg í kappingini, og at bankarnir missa pengar av sínum útlánum. Eftirlitið roknar við, at bankarnir fara at missa uppaftur meiri.

## Helms deyður

Fyrrverandi ovastin í amerikansku fregnartænastuni CIA, Richard Helms, er deyður. Hann var 89 ára gamal.

Richard Helms var ovasti í CIA frá 1966 til 1973. Hann noyddist frá, tá hann í 1973 sýtti fyri at hjálpa Richard Nixon, forseta burtur úr Watergate-gøluni, og seinni hava summi hildið, at tað var Helms, sum avdúkaði sjálva gøluna.

Richard Helms hevði eisini ein virknan lut, tá CIA gjørdi sítt til at fella forsetan í Chile, Salvador Allende. Skjøl, sum komu undan kavi, avdúkaðu, at Nixon hevði flutt CIA 10 milliónir dollarar, sum skuldu nýtast til kvettið, og skjølini avdúkaðu eisini, at forsetin hevði givið Helms boð um at skipa so fyri, at Allende varð koyrdur frá. Í 1977 varð Helms ákærdur fyri at hava logið, tá hann hann greiddi einari kongressnevnd frá amerikansku luttøkuni í kvettinum í Chile. Hann varð dømdur sekur, men slapp frá at fara í fongsul.

## Fangar gjørdu uppreistur

Minst 17 fangar fingu skaða, tá fangarnir í fongslinum Lincoln Prison í Bretlandi gjørdu uppreistur mikukvøldið.

Myndugleikarnir siga, at uppreisturin byrjaði um sjeytíðina, og at neyðugt var at senda næstan 300 løgreglumenn og trygdarfólk til fongslið fyri at basa uppresitrinum, men ikki fyrr enn út á náttina eydnaðist tað at fáa fangarnar at binda frið. Leiðslan í Lincoln Prison sigur, at fongslið hevur fingið stóran skaða. Fangarnir brutu nógv innbúgv og fleiri vindeygu, og nógvastaðni settu teir eisini eld á.

Bretskir fangar hava leingi kært seg um, at viðurskiftini í landsins fongslum eru alt ov vánalig.

## Besker slapp undan fongsli

Ein dómstólur í Týsklandi dømdi fyrradagin fyrrverandi tennisleikaran Boris Becker tvey ára fongsul fyri skattasvik, men dómurin er treytaður, so Becker sleppur frá at fara inn at sita.

Ákæruvaldið hevði kravt hálvt triðja árs treytaleysa fongsulsrevsing. Boris Becker varð funnin sekur í at hava snýtt skattavaldið, so hann var sloppin frá at rinda 30 milliónir krónur í skatti í tíðarskeiðinum frá 1991 til 1993. Becker viðgekk seg sekan.

Fyri skattavaldinum hevði Boris Becker upplýst, at hann búði í Monaco frá 1991 til 1993, men kanningar vístu, at hann var meiri í Týsklandi enn í Monaco, og at hann tí átti at rinda skatt í Týsklandi.